

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 03 - 2013

# Íslendingar byggja tað fyrsta veitingarskipið

Íslendska frálandafelagið Fáfnir Offshore ehf. hevur skrivað undir sáttmála við norska Havyard group um at byggja eitt veitingarskip, sum verður tað fyrsta frálandaskipið, sum verður bygt til íslendingar. Skipið, sum verður bygt til viðurskiftini í Norðurhøvum, verður tað dýrasta skipið í íslendsku søguni. Byggikostnaðurin er 330 milliónir krónur. Tað var uttanríkisráðharrin Össur Skarphéðinsson, sum boðaði frá sáttmálanum í gjar, og í hesum viðfangi segði hann, at við hesum verður Ísland til reiðar at møta teimum møguleikum, sum kunnu koma á norðurleiðum. Steingrímur Erlingsson, sum er forstjóri í Fáfnir, hevur verið virkin í fiskivinnu í Kanada, men síðani hann gavst við tí í 2011, hevur hann havt høvi til at seta seg inn í ta norsku tænastuvinnuna á sjónum, og nú heldur hann, at tíðin nú er komin til at fara undir at byggja eina slíka tænastu upp í Íslandi. -Hetta er tað fyrsta stigið, sigur hann. Tað nýggja skipið verður av slagnum Havyard 832L L WE. Skipið verður 88,5 metrar langt og 17,6 metrar breitt og serbygt til at flyta útgerð til og frá pallum. Manningin fer at liggja um 30.